gult10 cyan10 magenta10 svart10

VIÐMERKINGAR

Serskatting av hjúnum

Flemming Mikkelsen,
løgtingsmaður

Hóast nógvar atfinningar vóru móti uppskoti Sambandsfloksins um serskatting av hjúnum, so vóru tó nøkur, sum sóu tað skilagóða í uppskotinum og fingu tað samtykt.

Uppskotið, um serskatting av hjúnum, sum Flemming Mikkelsen, vegna Sambandsflokkin, legði fyri løgtingið, hevur vakt ans bæði fyri og ímóti.

Atfinningar

Í fyrstu atløgu var tað samgongan, sum ikki kundi semjast um uppskotið, hóast tað var fult í samsvari við teirra egna samgongugrundskjal.

Síðani gjørdi Javnstøðunevndin vart við seg, og fanst hvassliga at uppskotinum við tí ómotiveraðu yvirskriftini, at her var talan um eina serliga skattalóg fyri giftar menn, og fastlæsing av kvinnum.

Teimum á baki kom Kvinnusamskipan Føroya, sum harliga fanst at ætlanini at geva hjúnum serlig skattarættindi, bara tí tey eru gift.

Gevur valmøguleikar

Hóast alt hetta negativa, vóru tað onnur, sum sóu nakað positivt í málinum, og sum tordu at gera vart við seg. Hesi søgdu sína hugsan um tær samfelagsbroytingar, fram eru farnar í seinnu helvt av nú farnu øld, eisini innan familjuna, har foreldur, um tey vilja tað ella ikki, eru noydd at vera í vinnu, fyri at klára dagin og vegin.

Hesi mettu, at uppskotið var gott, tí hjún (serliga við børnum), eftir hesum fáa ein valmøguleika, um so er, at fíggjarligir møguleikar eru fyri, at annað av foreldrunum kann vera heima og ansa børnunum.

Nú áliggur tað landsstýrismanninum í skattamálum at tilevna eitt lógaruppskot, sum er í samsvari við uppskotið, sum løgtingið samtykti.

Hvar finni eg sannan frið?

Fríðgerð Mortensen
Tórshavn, 7. mai 2001

Tá eg blaðaði gjøgnum bløðini leygardagin, kom eg niður á lýsing við yvirskriftini Meditatión. Og sum tað stóð: "Find din indre fred og styrke og lær at dele den med verden omkring dig". Her verður bjóðað nakað, sum øll menniskjur søkja eftir.

Nú kann eg siga frá, at eg havi funnið mín innara frið og styrki. Men ikki ígjøgnum viðgerðarhættir, sum hava sín uppruna í eysturlendskum religiónum, sum allar byggja á, at ein skal royna at strevast fyri at náa upp til Gud, at toknast Honum. Kristindómurin er beint mótsett hesum, her er tað Gud, sum hevur boygt seg niður til okkara, ja Hann hevur boygt seg longur niður enn tann djúpast fallni syndarin liggur. Tí er tað ikki so torført at koma í samband við Hann, Tað er heilt einfalt: "Trúgv á Harran Jesus Kristus, so skalt tú verða frelstur!" Apostlasøgan 16,31.

Jesus hevur sannan frið at bjóða menniskjum, men tað eru tíverri so fá, sum vilja fara tann vegin. Tað er ov lætt, og tí sigur tað teimum onki. Nei, tá tiltalar hitt tey meira, tað, at skula gera nakað sjálvur fyri at uppnáa sín innara frið og styrki.

Men tað, sum hendir ta løtu tú kemur til Jesus og tekur ímóti Honum, er at tú fært tað, sum Hann hevur at bjóða fyri einki. Hann hevur gjørt alt, soleiðis at tað er ein nýggjur og livandi vegur fyri teg inn til Gud. Jesus sigur í Jóhannes ev. 14,27: "Frið lati Eg tykkum eftir, frið Mín gevi Eg tykkum; ikki sum heimurin gevur, gevi Eg tykkum. Hjarta tykkara óttist ikki og missi ikki mótið!".

Eg havi brúkt somu uppskrift, sum omma mín brúkti fyri uml. 80 árum síðani, og hetta virkar líka væl enn í dag. Í dag kann eg av hjarta syngja sangin, sum omma lærdi meg:

Jesus um teg vil eg syngja, Tú sum úr leinkjum meg loysti, Tú sum av deyða meg reisti ~ Lær meg at syngja um teg!

Nú eru bondini slitin, Jesus nú býr mær í hjara, Horvin er náttin hin svarta, Jesus er ljós mítt og lív.

Við míni hørpu eg siti Glaður í veingjanna skugga, Fyrr kundi einki meg ugga, Nú hevur hjarta mítt frið

Nú kann eg Jesusi lova, Nú kann mín sál honum prísa. Hjarta mítt ynskir at vísa, øðrum hans kærleik og mátt.

Tá so mín tíð er at enda. Í hesum skugganna dali, Tá skal í Himmalsins sali Betur eg syngja hans prís.

Tí skulu míni ráð verða til tín, sum leitar og søkir eftir sonnum friði og styrki. Set títt álit á Harran Jesus Kristus, og tú skalt sanna at HANN verður tín friður og styrki, og at tað ikki finnist í alternativum viðgerðarhættum ella inni í tær sjálvum. Hesin friðurin er ein øðrvísi friður enn tann,ið heimurin gevur, og kann ikki keypast fyri pening.

Ein friðsælur sólargeisli á deyðastrá

Sjúrður Poulsen
Velbastaðvegur 36
Tórshavn

Tvær sannar lagnusøgur frá farnu øld

Sæl eru tey friðsomu, tí at tey skulu verða kallað Gudsbørn. Alt at okkara døgum hoyra vit gomlu vøkru heilsanina: "Guds – friður í húsi". Tey, ið bóru hesa heilsan fram, vóru helst eldri fólk, ið ikki vóru hvønndags gestir, ið komu á dyr. Tá ið vitjanin var liðug, og tey lótu hurðina spakuliga eftir sær, varð seinasta orðið: "Jesus verði eftir hjá tykkum".

Hesar heilsanir vórðu bornar fram á slíkan friðsaman og hátíðarligan hátt, at uttan iva hevur hetta sett síni djúpu spor bæði í sinn og sál, serliga í unga og viðkvæma barnalyndið.

Hetta ynski forfedra okkara samsvaraði væl við høvuðsynski Paulusar apostul á vinmenn sínar, at: "Alt, ið fer fram tykkara millum, lati tað vera í friði og sóma".

Sólargeislin

Pól var meira enn seks ára gamal, áðrenn hann kundi taka seg upp frá gólvi ella túni og stíga nøkur fet. Annars eitt sera vakurt og góðsligt dreingjabarn. Eyguni vøkur, smílandi og blá.

Hann var borin í heim á Krossmessu 1882. Um hetta mundið, var læknavísindin ikki komin so væl fyri seg. Seinni vísti tað seg, at hann hevði bæði barnalammilsi og ensku sjúkuna. Tá ið hann skuldi til gongu vísti tað seg, at beinini bóru hann ikki, men høvdu hug til at kropna. Kortini kom hann so væl fyri seg, at hann kundi luttaka í øllum vanligum arbeiði. Í kirkju gekk hann so framt, sum at klokkan ringdi. Tveir stavar hevði hann til hjálpar. Deyðamóður plagdi hann at koma inn í kirkjuna, faldaði hendurnar og legði pannuna niður á fremra stólarygg og hvíldi seg. Óivað hevur hann eisini biðið eina bøn. Friðurin var so góður í kirkjuni, plagdi hann at siga.

9/2-1963 andaðist hann ein so sera vakran dag. Mamma mín, ein systir mín og ein onnur skyldkona sótu inni hjá honum. Hetta var í heimi okkara, tí hann var ógiftur og farbróður mín. Týðiligt var henda dagin, at hetta fór at verða hansara seinasti.

Mamma sigur stillisliga við hann: "Pól, heldur tú ikki, at tað verður stuttligt at síggja mammu og pápa tín aftur, tá ið tú kemur í Himmiríkið? Jú, tað gleði eg meg til. Eina lítla løtu seinni reistist hann hálvavegna uppundir seg, og hyggur móti vindeygganum og smílist. Akkurát hesa løtu skein ein sólargeisli inn um gluggan. Hann legði seg niður aftur á koddan og sovnaði burtur.

Tær triggjar, ið inni vóru, høvdu oftani á munni, at tær ongantíð fóru at gloyma tann frið, ið skein av andliti hansara. Friðurin var so góður, plagdi hann at siga.

Hin søgan er um Sunnevu, ið búði nøkur fet longur niðri í bygdini. Hon fekk ta tungu lagnu at bera, at bæði maður og einasti sonur hennara fórust við Florens undir Íslandi í 1927. Eina dóttur hevði hon eftir, men sum rímiligt var, hon giftist og flutti úr sínum barnaheimi, so Sunneva kom at sita einsamøll einkja eitt langt lív. Í 1942 andaðist hon gomul og troytt av døgum.

Í sambandi við Gudsótta og frið, fari eg at nevna tvey dømi, sum eg minnist um hesa gomlu einsamøllu konu.

Hon var, sum fyrr sagt einsamøll í húsi bæði nátt og dag, sum so mong einkja um hesa tíð. Ofta stakk hon inn á gólvið hjá okkum. Og eitt kvøldið hoyrdi eg systir mína,ið ikki var annað enn ein stór smágenta, spyrja: "Sunneva, tora tygum at sova inni einsamøll? Á ja stakkal, hvønn skal eg óttast. Hevur tú ikki sætt, at eg havi bæði bíbil og bønarbók inni í sovikamarinum. Hvønn skal eg tá óttast? Nei góða, Sunneva leggur seg í Gudshendur".

Hon andaðist mitt undir seinra veraldarbardaga, og viður var eingin at fáa. Tá ið hon merkti, at deyðin nærkaðist í stórum, sendi hon boð eftir pápa mínum eitt kvøldi, og skuldi tosa við hann.

Komin niðan aftur frá Sunnevu spyr mamma pápa, hvat Sunneva vildi. Jú segði hann, hon vísti mær á ein millumvegg inni í húsinum. Har eru nakrar vakrar fjølir, sum Janus og tú fáa gjørt mær eina kistu burturúr. Eg verið ikki her leingi afturat, og viður fæst eingin. Á páskum verið eg í Himmiríki. Langafríggjadag andaðist hon. Hon gleddi seg til Gudsfriðin.

Við vilja havi eg fleiri ferðir í hesum stuttu frásagnunum nevnt frið og eisini sóma.

Eftir siti eg kortini, helst saman við fleiri øðrum við einum spurningi. Hvussu ber tað til, at so mong kristin fólk her á landi vilja hava Gudsorðið borið fram við so miklum bulduri og braki? Í hesum døgum tykist tað, sum at ein mikrofon ella bara okkurt klapp er nokk fyri at stuðla prædikumannin. Nei, nú skal helst hvør hava sína mikrofon, og klappini skulu samskipast, so at eingin ivi skal vera um, at her er ynski og álvari aftanfyri. Nú tykist prædikumaður vera lítið í metum, kann hann ikki gera eitthvørt undurverk ella vekja deyð aftur til lívs.

Hvussu skal tað svar nú skiljast, sum ríki maðurin fekk, tá ið hann bað faðirin um at senda brødrum sínum tekin, so at teir kundu venda um, og ikki eisini koma í henda pínslustað?

Svarið var jú, at lýða teir ikki á Móses og profetarnar, tá munnu teir heldur ikki vilja trúgva, um onkur reis upp frá deyðum.

Sunneva leit á sína bíbil og sína bønarbók, og kravdi ikki onnur tekin.

gult11 cyan11 magenta11 svart11

Kvæði til ungdómin

Árni Dahl legði fram nýggju bók sína um føroyskan dans á samkomu í Býráðssalinum leygardagin
Mynd: Jens Kristian Vang

Árni Dahl greiddi leygardagin frá nýggju bók síni, sum tekur støði í føroyingasøguni. Kvæðini eru vald út, soleiðis at tey hóska til fólkaskúlan, sigur Árni Dahl

UMMÆLI
Heri á Rógvi

Eftir stórsligna tiltakið á Vaglinum, har dansistevnan varð sett, savnaðust fólk inni í Býráðssalinum. Salurin, har býráðslimirnir í Havn vanliga halda til, var karmur um eina framløgu um nýggju bókina hjá Árna Dahl. Heilt fitt av fólki høvdu leitað sær innar í Býráðssalin, og ein kendi seg ikki lítið malplaseraðan ikki ílætin føroyska tjóðarbúnan. Onkur politikari royndi at vegleiða fólki í hvar best var at sita í Býráðssalinum. Tað var tó ikki so nógv fyri at royna bleytu stólarnar hjá býráðspolitikkarunum, men heldur fyri at síggja og hoyra hvat Árni Dahl hevði upp á hjarta.

Árni Dahl er rættiliga kendur í kvæðahøpi, og er hetta ikki hansara fyrsta bók, har evnið er kvæði. Eftir at onkur frá Bókadeild Føroya Lærarafelags hevði lastað tað, ið hann hevði upp á hjarta, víðari, so var klárt hjá Árna Dahl. Sjálv framløgan tók ikki ta stóru tíðina, og steðgurin í Býráðssalinum var merktur av at vera ein søluframløga.

Til Fólkaskúlan

Bókin kallast vinnmenn, og tekur bókin støði í lívinum hjá vinmonnunum Sigmundi og Tóri. Árni Dahl greiddi frá, at arbeiðið við bókini byrjaði afturí í 1997.

Røturnar leita tó longur aftur enn so, og tekur arbeiðið við bókini støði í arbeiðinum hjá einum arbeiðsbólki, sum varð settur at arbeiða í sambandi við, at kvæði hava fingið fast pláss í nýggju fólkaskúlalógini. Tað er Sláið Ring, sum stendur aftanfyri bókina, og havi eisini fíggjað tað mesta av henni.

Sláið Ring heittu á Árna Dahl um at taka sær av arbeiðinum. Arbeiðið at veruliga dyk á seg, tá Edward Fuglø játtaði at gera tekningar til bókina. Árni Dahl nýtti eisini høvið til at rósa Edwardi fyri gott arbeiði. Tað skal eisini sigast her frá, at tekningarnar hjá Edwardi Fuglø eru frálíkar og prýða almikið um bókina. Somuleiðis ber tað til at siga, at føroysku kvæðini eiga góðar vinmenn í Árna Dahl og Edwardi Fuglø.

Bókin er býtt í fýra deildir, og verða fimm kvæði nýtt. Árni Dahl segði, at hvør deild viðgerð eitt tíðarskeið í lívinum hjá Sigmundi og Tóri. Tey fýra tíðarskeiðini verða lýst við kvæðum, og pørtum av Føroyinga Søgu, sum Árni Dahl hevur latið í nýggjan meiri ungdómsvinarligan ham. Tað er ætlanin, at bókin skal vera við til at stimbra áhugan hjá teimum ungu fyri føroyska dansinum. Bókin um vinmenninar báðar fekk eisini góða móttøku leygardagin, tá fólk um alt landið savnaðust um føroyska dansin.

Jólagávur í úrtíð

Fyri stuttum fekk Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn vitjan av fólki frá Fonden Børnehjælpsdagen af 6. maj 1904, sum kom við ymsum leikum og bókum til hotellið.

Tað var Paula Bøgesvang úr Havn, sum fyrr hevur arbeitt hjá Børnehjælpsdagen, sum stóð fyri útbýtingini á Hotel Tórshavn. Endamálið við tiltakinum var at spreiða gleði og gott lag á barnadeildini hjá sjúklingahotellinum og geva børnunum eitt positivt upplivilsi, sigur Børnehjælpsdagen í tíðindaskrivi.

Barnahjálpardagurin er ein sjálvsognarstovnur, sum saman við sjálvbodnum, eitt nú skótum og ítróttarfeløgum, stuðlar børnum og ungum í Danmark við gávum, sponsoreringum og beinleiðis hjálp til sjálvboðið barna- og ungdómsarbeiði.

ej

Nú skínur sólin aftur á Argjum

Týsdagin 22. mai kl. 13.00
letur Snar-sól á Argjum
hurðina upp fyri fyrstu ferð

Snar-sól hevur tær nýggjastu sólirnar í Føroyum við teimum beestu rørunum m.a. "Ergoline Open-Sun" lá ikki er sædd í Føroyum áður



Snar-Sól hevur opið hvønn dag frá kl. 07.00 til 23.00
sera góðar parkeringsumstøður

Snar-sól
Støðlagøta 13
160 Argir